# Deildarleiðari til framleiðsluvirkið á Kambsdali

Søkt verður eftir deildarleiðara til nýggja framleiðsluvirki okkara á Kambsdali. Deildarleiðarin fær ábyrgd av at byggja virksemið upp saman við teimum starvsfólkum, hann verður við til at seta. Starvið fevnir um bæði fyrisiting á leiðslustøði og skipan av dagliga arbeiðnum á virkinum.

**Førleikar**

- Handaliga útbúgving.
- Góð leiðsluevnir.
- Arbeiðssamur/som, dugnalig/ur og røkin.
- Væl skipað/ur.
- Góðan kunnleika til kunningartøkni.
- Góð samstarvsevnir.
- Dugir at leggja arbeiðsuppgávurnar til rættis eftir førimuninum hjá brúkaranum.
- Dugir at samskifta við fyritøkur, viðskiftafólk og onnur uttanfyri stovnin.

Tað kann verða ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan líknandi øki ella av egnum virki.

Starvið hevur tilvísing til stjóran og verður at seta 1. august 2009 ella skjótast tilber.

Lønin verður javnlíknað við pedagogiska økið, smáir búðstovnar.

Áhugaði kunna venda sær til Kristinu T. Larsen, stjóra, á tlf. 55 00 74 fyri at fáa fleiri upplýsningar.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 4. juni 2009. Umsókn saman við prógvið, royndarváttan v.m.skal sendast til alv@alv.fo ella til:

Sjálvsognarstovnin ALV
Boks 301
110 Tórshavn

Brævbjálvin skal hava áskrivað:
»Umsókn deildarleiðari«

**Um virksemið:** Høvuðsvirksemi á virkinum verður ein endurnýtsluhøll, har gamlir møblar og lutir verða umvældir og síðan seldir. Eftir ætlan fer framleiðsluvirkið eisini húsa fremleiðslu av ymiskum lutum ella pørtum av framleiðslutum fyri føroysk virkir. Við hesi vinnu skapa vit eini 20 arbeiðspláss fyri fólki, ið hava fingið tillutað hálva ella fulla pensjón. Hesi eru ein partur av Føroya fólki, sum vanliga ikki eru so sjónlig á føroyska arbeiðsmarknaðinum, men sum gjøgnum mennandi tilboð kunnu geva sína arbeiðsmegi til føroyska samfelagið, og soleiðis eisini vera við til at geva vinnulívinum í Føroyum størri og fjølbroyttari arbeiðsmegi. Virksemið er ikki fyri fólk við menningartarni.

---

**Dagstovnin á Argjum**
Traðagøta 55 · 160 Argir

# Námsfrøðingar
## til Dagstovnin á Argjum

Vísandi til Dagstovnalógina søkir Dagstovnurin á Argjum eftir einum námsfrøðingi til vøggustovu, og ein til bólkin við teimum 6. ára gomlu, at byrja 1. august 2009 ella eftir nærri avtalu.

Um eingin námsfrøðingur søkir, eru hjálparfólk við royndum vælkomin til at søkja.

**Lønarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Gudrun Winthereig Rasmussen, leiðara á telefon 219019. Kunning er eisini á heimasíðu okkara www.dstargir.fo

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum, Traðagøta 55, 160 Argir, og verða okkum í hendi í seinasta lagi leygardagin 6. juni 2009.

---

**FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ**

# BÓKAVØRÐUR

Á Fuglafjarðar Bókasavni er eitt starv sum bókavørður leyst at søkja til 1. august 2009.

Tann, ið sett/settur verður, skal arbeiða við øllum vanligum bókavarðaarbeiði í tøttum samstarvi við Kunningarstovuna í Fuglafirði, sum heldur til í somu húsum, sum bókasavnið.

Til starvið krevst útbúgving sum bókavørður.

Starvið kann verða sett við niðursettari tíð og verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Um ongin við bókavarðaútbúgving søkir, kann annar persónur røkja starvið. Víst verður til løgtingslóg nr. 148 um bókasøvn.

Umsóknir saman við próvskjølum verða at senda til Fuglafjarðar Býráð, Postsmoga 30, 535 Fuglafjørður í seinasta lagi 09. juni 2009 kl. 10.00.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737700.

*Fuglafjørður, tann 15. mai 2009*

**FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ**

---

# Háskúlaskeiðið

**August - Desember 2009**

**Eitt fjøltáttað skeið**

saman við Vrå Højskole í Danmark og Ringerike Folkehøgskole í Noregi. Tað verður undirvíst á øllum trimum skúlunum-næmingar og lærarar ferðast ímillum.

Vallærugreinir. Felagstiltøk. Evnisdagar- og vikur við norðurlendskum filmi, bókmentum, kreativum verkstøðum og námsferðum.

Set teg í samband við okkum og hoyr meira um skeiðið

**Føroya Fólkaháskúli**
Háskúlavegur 14 - 100 Tórshavn
tlf. 31 17 43
haskulin@haskulin.fo - www.haskulin.fo

---

**ÁRSAÐALFUNDUR**

Føroya Blindafelag hevur ársaðalfund leygardagin 6. juni 2009 kl. 14.00

Fundurin verður hildin á sjóndeplinum, Íslandsvegur 10 A, Tórshavn

Skrá sambært lógum felagsins

**Nevndin**

---

# Flagtekju?

Norskar flagtekjur
Skjótt og ómakaleyst
Eisini hava vit nævur og torvhaldsjørn.
Ring og fá eitt óbindandi tilboð.

**SJÓVINNUBÚÐIN**

v/ Jákup á Lag · P.O. Boks 230 · FO-110 Tórshavn
Tel +298 584020 · sjovinnubudin@kallnet.fo

---

# Interior

v/G. Gunnbjørgsdóttir - Innanduraarkitektur

Ráðgeving innan innrætting.
Íblástur til persónligan stíl.
Vegleiðing til rætta tilfarið.
Hugskot til perfekta rúmið.
Lítil sum stór tilboð verða givin til privat hús, handlar, skúlar, matstovur o.m.a.

**tel. 258543**

*Gunnbjørg Gunnbjørgsdottir*

---

LØGTINGIÐ

**fulltrúi/ráðgevi í Løgtinginum**

Í umsiting Løgtingsins er eitt starv sum fulltrúi ella ráðgevi leyst at søkja til setan 1. august 2009.

Starvslýsing og nærri upplýsingar um starvið eru at finna á www.logting.fo.

*Løgtingið, 20. mai 2009*

---

W W W . N O R M E K . F O
NORMEK


Tróndargøta 63 · FO-512 Norðragøta
Tlf 442002 · normek@normek.fo

Lesið Sosialin -tað loysir seg